Skráseting Føroya

DØMI UM

viðtøkur fyri eitt partafelag

Útgivið av

Skráseting Føroya

Tillagað februar 2018

Viðtøkur fyri P/F *(navn verður sett inn).*

§ 1
Navn felagsins er P/F *(navn verður sett inn)*
(Møgulig hjánøvn verða sett inn)
(Tað er ikki krav at heimstaður skal standa í viðtøkunum. Tað ber tó til at seta felagsins heimstað í viðtøkurnar.)

§ 2
Endamál felagsins er at reka virksemi við (*set inn felagsins endamál)* umframt annað virksemi í hesum sambandi.

§ 3
Partapeningurin er kr. 500.000 býttur í partabrøv á kr. 1.000 ella margfald av hesi upphædd. *(Størri upphædd og annað býti kann setast inn)*

Á aðalfundi eigur hvør partaeigari eina atkvøðu fyri hvørjar 1.000 kr. hann eigur í partapeningi. *(Onnur upphædd kann verða sett inn)*

§ 4
Partabrøvini skulu ljóða uppá navn og vera skrivað inn í partabrævabók felagsins. Partabrøvini skulu ikki vera umfaraskjøl.

§ 5
Aðalfundur verður fráboðaður 14 dagar frammanundan við brævi til hvønn einstakan partaeigara. Brævið skal innihalda fundarskrá við tilskilan av fundarstaði og tíð. Av fundarskránni skal síggjast hvørji mál, ið skulu viðgerast á aðalfundinum.

§ 6
Dagsskráin fyri aðalfundin skal umfata *(Henda áseting er <u>valfrí</u>, tá vinnufelagslógin ikki inniheldur krav um, at dagsskráin fyri aðalfundin skal standa í viðtøkunum)*

a) Val av fundarstjóra
b) Frásøgn nevndarinnar frá virki felagsins í farna ári
c) Framløga av ársfrásøgn og ársfrágreiðing til góðkenningar
d) Avgerð um nýtslu av yvirskoti, ella rindan av halli sambært góðkenda roknskapin
e) Val av nevndarlimum
f) Støðutakan til grannskoðara
g) Ymiskt

§ 7
Felagið verður stýrt av eini á aðalfundi valdari nevnd ið hevur 3 – 5 limir. Nevndarlimir verða valdir fyri eitt ár í senn.

Nevndin setir ein stjóra.
(Annar møguleiki er at velja leiðsluskipan við eftirlitsráði og stjórn)

§ 8
Felagið verður teknað av einum stjóra ella av allari nevndini í felag.
(Onnur tekningarregla kann setast inn, eisini um onnur leiðsluskipan er vald)

§ 9
Ársfrásagnir felagsins verða grannskoðaðar av einum á aðalfundi valdum grannskoðara, sum verður valdur fyri 1 ár í senn.
(Henda áseting er valfrí, tá vinnufelagslógin ikki inniheldur krav um, at upplýsingar um grannskoðara skulu standa í viðtøkunum)

(Um avgerð er tikin um at grannskoðan av felagsins ársfrásagnum er frávald í stovningar-skjalinum kann henda orðing brúkast: "Á hvørjum ársaðalfundi verður støða tikin til, um felagið ynskir ársroknskapin grannskoðaðan. Aðalfundurin kann velja ikki at hava grannskoðan, um ársroknskaparlógin heimilar hesum.")

§ 10
Roknskaparár felagsins er frá *(dagfesting verður sett inn)* til *(dagfesting verður sett inn)*
Fyrsta roknskaparár gongur frá stovnan felagsins til *(dagfesting verður sett inn)*

(Staður og dagfesting verður sett inn)